# Føroya Tele

**Ørindafólk**

Føroya Tele søkir eftir einum ørindafólki.

Arbeiðsuppgávurnar verða fyrst og fremst:

- ørindi millum deildir og bygningar í Tórshavn
- ábyrgd av fundarhølum í samband við skeið, fundir og tí, sum hartil hoyrir
- ymiskt fyrifallandi arbeiði, t.d. kopiering, arkivering
- onnur ørindi

Neyðugt er, at tann, ið sett/ur verður,

- er álítandi, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevnir
- hevur koyrikoyrt

Lønin verður sambært sambært sáttmála millum Starvsmanna-felagið og Føroya Tele.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Stjórnar-skrivstovuna á tlf. 303030.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. oktober 2000.

Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
FO - 110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

# Føroya Tele

**Maskinmeistari søkist**

Søkt verður eftir maskin-meistara ella fólki við líknandi útbúgving til Byggi- og Eldeilduni hjá Føroya Tele. Umsøkjarar, ið hava el-góðkenning hava fyrimun, men hetta er eingin treyt.

Byggi- og Eldeildin hevur arbeiðsuppgávur um alt landið, m. a.:

- Rakstur og viðlíkahald av bygningum og el-installatiónum
- Prosjektering av ný- og umbyggingum
- Byggieftirlit
- Rakstur og viðlíkahald av dieselmotorum
- Rakstur og viðlíkahald av køli- og ventilatións-skipanum
- Rakstur av CTS-anleggum

Á deildini starvast installatørur, elektrikari, byggifrøðingar og húsavørðar.

Starvið er eitt áhugavert framtíðarstarv. Tann ið verður settur kemur at hava dagligu rakstrarábyrgdina av dieselaggregatum, køling, ventilatión, CTS o.ø. Saman við leiðaranum kemur hann eisini at gera langtíðar-ætlanir í samband við nevndu uppgávur.

Umráðandi er, at umsøkjarin hevur royndir í at arbeiða sjálvstøðugt, og eisini er førur fyri at arbeiða saman við øðrum.

Starvsstaðurin er Tórshavn, men umsøkjarin skal eisini ferðast um landið og skal tí hava koyrikort.

Lønin verður sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Kára Dal-Christiansen, deildarleiðara á telefon 303030.

Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. oktober 2000. Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
Fo-110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

Allir prentlutir í góðum hondum hjá

HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað



RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers
Á GLAÐSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Heimasíða: www.rasmussen.fo



# Stóra bringu

## -ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

# SJÓ-FRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22

Trukkar, stáblarar og BT lyftivognar til tygara tørv!



Vit útvega EXIDE battaríir, løðitól til øll merkir av trukkum og stáblarum

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Original
bosal
Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

*Halt* sosialin







LMB

# Leiðsluskeið

## í e-handli (e-business)

**Ole Riis-Pedersen, varastjóri við Handilsháskúlan í Odder, kemur til Føroya at hava evnisskeið undir hesum heiti:**

### E-handil í einum virki byrjar innanífrá

Endamálið við skeiðinum er at geva luttakaranum innlit í e-handil. Eisini verður ein framløga givin av ymiskum faktorum, sum eru neyðugir at taka støðu til, áðrenn avgerð kann verða tikin, um títt virkið verður verðandi í business, ella virksemið verður økt til eisini at umfata e-business.

Framferðarháttur:
Umframt fyrilestur um e-handil, bjóðar skeiðið eisini smáar venjingar, har vit diskutera evnir sum eru viðkomandi at lýsa og taka støðu til, áðrenn virkið er ført fyri at taka avgerð um, um tað loysir seg at fara inn í e-handil.

Eingin liðug virksemisætlan verður givin á skeiðnum, men skeiðið leggur upp til skipað kjak av teimum lyklaøkjum í fyritøkuni, sum mugu verða greið, áðrenn strategiir og strategielementir verða løgd til stovnsetan av e-handli.

**Ole Riis-Pedersen hevur júst lokið Master-útbúgving við handilsháskúlan í Keypmannahavn.**

**Tíð:** 03. oktber 2000 kl. 14.00-21.00
**Stað:** Hotel Føroyar. Bjóðað verður:
Kaffi við heimabakaðum køkum
Døgurði við tveimum rættum og onkrum leskandi afturvið
Kaffi við smákøkum
**Tilmelding:** **Føroya Handilsskúli**, Marknagilsvegur 177, Fo-100 Tórshavn
Kontaktpersónur: Ritva Samuelsen,
T-postur:rs@hsh.fo
**Freist:** 28. september 2000
**Kostnaður:** kr. 1550.00
**Málbólkur:** Skeiðið er serliga ætlað fyritøkum, sum umhugsa at fara inn e-handil. Toppleiðsla, millumleiðsla, komandi leiðarir og annars øll, sum hava áhuga í nútímans leiðslu.

LeiðsluMenningarBólkurin
**FØROYA HANDILSSKÚLI**



LMB

# Leiðaraskeið

## Leiðsluframferð

**Endamál:**

- Tú fært vitan um og innlit í at brúka tíni evni og førleika í bólkum við felagsábyrgd fyri úrdrátti, mannagongd og arbeiðshátti
- Harafturat fært tú vitan um hættir, ið vísa á førleikar hjá tær sjálvum og øðrum við atliti at skapa grundarlag fyri framtíðar avgerðum.

**Grundhugsan:**
Skeiðið tekur støðu í hesi hugsan: Leiðarar og starvsfólk fáa í størri mun ábyrgdina av í felag at seta mál, skipa, stýra og menna loysnina av eini uppgávu í felagsskapinum.

**Innihald:**
Tað verður arbeitt út frá gerandisdegi luttakaranna við:

- Stovnan, umsiting og endurnýggjan av felags viðurskiftum
- Skipan av loysnum av uppgávum
- Eygleiðing av arbeiðshættum og feedback mannagongd
- Samrøður í starvsfólkamenning og við atliti at menna evni og førleika hjá tær sjálvum og øðrum
- Innan- og uttanhýsis sambond
- Framferðarmotiv
- Framferðarrák
- Viðgerð av tvístøðum
- Avhendan
- Leiðslu út frá givnari støðu
- Serkunnleika og leiðslu

**Tíð:** Hósdagin 19. oktober kl. 09.00 til Leygardagin 21. oktober kl. 16.15
**Staður:** **Hotl Eiði**
**Skeiðleiðari:** **Peter Gram** frá LMB
**Kostnaður:** Kr. 7.500,- fyri hvønn, íroknað matur og gisting
**Tilmelding:** Áðrenn 4. oktober 2000

*LMB (LeiðsluMenningarBólkurin) er ein arbeisbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin Heystið 2000 fevnir um hesi skeið: Leiðsluframferð - Leiðslumenning og læra at loysa trupuleikar - Grundskeið í leiðslu.*

**Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum.**
**Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:**

LeiðsluMenningarBólkurin
**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS**
Marknagilsvegur 77 • Postmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374

Íbúð ella kamar ynskist til ein av starvsfeløgum okkara



Salong Bylgjan
Billugøta 2 • 160 Argir • Tel. 31 54 94

sosialurin
www.sosialurin.fo

# Frá Javnaðar-flokkinum

**Landsstevnuveitslan**

verður í kantinuni á Læraraskúlanum leygarkvøldið kl. 20. Orkestrið Driv spælir. Kostnaður 150,-

Tekning fer fram á tlf. 317561.

**Javnaðarflokkurin**

# Handilsfólk

Til handil okkara søkja vit handilsfólk at byrja beinanvegin.

Talan er um eitt fulltíðarstarv til 1/2 feb. 2001.

Hevur tú staðið í handli fyrr hevur tú fyrimun.

Løn eftir avtalu.

Skrivað nakrar reglur um teg sjálvan, kanska er hetta nakað fyri teg?

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
ESTABLISHED 1932
Kongabrúgvin • 100 Tórshavn • Tel. 311731 • Fax 318532